# KT2004 síðurnar

Í hesum og komandi bløðum setir Sosialurin sjóneykuna á stevnuna KT2004, sum verður í Norðurlandahúsinum 22. og 23. apríl. Fyrilestrar verða umrøddir, og virkini verða lýst.



Høvuðstuðlar: Atlantic Airways, bp, Tryggingarfelagið Føroyar, Microsoft

# Óynsktir gestir fáa durafjórðingin

**Tíðin er komin at taka KT-trygd í álvara. KT2004 tekur evnið upp, og leiðandi trygdarstjórar eru komnir higar at greiða frá. Hvør einstøk fyritøka noyðist at orða sín egna trygdarpolitikk og smíða sín egna verjugarð, og til tess eru amboð, sum verða gjøgnumgingin á stevnuni**

## KT-TRYGD

Tað er ein vanlukka fyri eina fyritøku, um hon brennur í grund. Tí tryggja virki seg og seta brandmúrar, eldsløkkjarar og sprinklaraskipanir upp. Hvørva allar upplýsingar í eini fyritøku, er fyritøkan í grundini eisini burtur. Men onkursvegna er tað ikki so umráðandi hjá virkjum at tryggja seg ímóti hesum. Tað er kanska menniskjaligt.

Bygningar og innbúgv síggja og føla vit, og tað fær beinanvegin avleiðingar, um tey hvørva. Við kunningarskipanum og dáta er øðrvísi. Tað er sjálvandi troyttandi, at telduskipanin ikki virkar í nakrar dagar, men vit kunnu fara til arbeiðis kortini. Verri er við óynsktum gestum í telduskipanini, sum kunnu gera óbótaligan skaða og kosta fyritøkuni dýrt.

KT-trygd er ein av teimum týdningarmestu íløgunum næstu árini, vísa kanningar í okkara grannalondum, har vantandi KT-trygd verður mett sum ein tann størsti trupulleikin hjá fyritøkum.

KT2004 tekur spurningin um KT-trygd í Føroyum upp. Fyrilestrar verða hildnir í Útvarpshøllini og í Dansistovuni fríggjadagin 23. apríl, og allir fyrilestrarhaldararnir eru trygdarstjórar í stórum donskum fyritøkum. Røtt verður um grundleggjandi KT-trygd, um KT-trygd í smærri og miðalstórum virkjum, um verkseting av KT-trygd og um KT-trygd út frá einum leiðslusjónarmiði.

Ein av fyrilestrarhaldarunum er Carsten Heilbuth, sum hevur arbeitt einamest við KT-trygd í Danmark. Hann er trygdarstjóri í KMPG og er millum annað limur í ráðnum fyri KT-trygd. KPMG IT Risk Management er millum tey leiðandi grannskoðara- og ráðgevaravirkini í KT-trygd.

Carsten Heilbuth sigur, at smærri og miðalstór virki ikki altíð eru greið yvir, hvussu bundin tey í grundini eru av kunningartøkni. Tey hava kanska keypt sær eina antivirus-skipan og halda alt vera í fínasta lagi, men tað er tað ikki. Tað ræður um at viðurkenna trupulleikan, og tástaðni ber til at stinga ein KT-trygdarpolitikk út í kortið. Tú skalt skipað fara ígjøgnum, hvørjar hóttanir, vandar og avleiðingar eru, og nústaðni tá ber til at gera eina heildarmeting og -ætlan.

Heilbuth leggur dent á, at ein fyritøka sjálv orðar sín trygdarpolitikk og ikki skrivar hann av eftir onkrari aðrari, tí trygdin skal lagast til tær mannagongdir, sum eru galdandi fyri akkurát tína fyritøku.

Vitja KT-stevnuna og fá eyguni upp fyri trygdini, áðrenn óynsktir gestir fáa eygu á tína fyritøku.




## Fyrilestrar um KT-trygd, fríggjadagin 23. apríl

Útvarpshøllin

1. Carsten Heilbuth, trygdarstjóri í KPMG:
   KT-trygd sæð úr einum leiðslusjónarmiði (11.00-11.35)

2. Kim Stengel, trygdarstjóri í Velux:
   Praktisk verkseting av BS7799/ISO17799 (11.35 til 12.15)

Uppleggingini verða ein heild

Dansisalurin

1. Vibe Vallentin Jensen, trygdarstjóri í Ernst & Young:
   KT-trygdarviðurskifti og KT-trygdararbeiði í smáum virkjum (kl. 10.30)

2. Niels Rasmussen, trygdarstjóri í Nykredit:
   Grundleggjandi KT-trygd løgd eftir sunnari fornuft (kl. 14.30)





# Slóðbrótarar bróta upp úr nýggjum

**Hvat hava lundin, havørnin og sildberin til felags? Ein spurningur, sum fær fólk at hyggja grunandi upp í luftina. Svarið er at finna hjá Com-data, ið setti hol á eina føroyska KT-vinnu fyri 25 árum síðan. Com-data flýgur framvegis í fremstu røð á fleiri økjum**

KT-kollveltingin kom tíðliga til Føroya samanborið við onnur lond. Longu í 1980 vórðu fyrstu forritini smíðað at stýra framleiðsluni á fiskivirkjum. Tað var Com-data, sum slóðaði fyri, og fyritøkan livir framvegis við sítt fríska lív.

Fyrsta starvsfólkið hjá Com-data, Olivur Thomsen, er í dag stjóri, og forritini til bókhald og lønarskipanir, sum eru víðkað, ment og útbygd síðan, eru framvegis millum tey mest álítandi á føroyska marknaðinum. Tað vitnar um góðsku og álit og er eitt prógv fyri, at fyrsta føroyska KT-fyritøkan ikki hevur sovið í tímanum.

## Tríggir skilafuglar

Fleiri av forritunum hjá Com-data eru navngivin eftir føroyskum fuglum. "Lundin", sum er tiltikna bókhalds- og roknskaparskipanin, er oddafuglur og hevur sera gott orð á sær millum fólk. Hendan skipanin er tann nógv mest nýtta kring landið av sínum slagi. Upprunaliga er hon ment í DOS, men hóast hon nú er ávegis til Windows, so eru tað framvegis tey, sum eru so glað fyri gamla klassikaran, at tey halda fast við lundan, sum setir lítil krøv til telduna og er einfaldur at brúka.

Eftirkomarin hjá lundanum í Windows „Sildberin" er um at verða klárur. Hann koyrir longu fleiri staðni sum ein vøru-, faktura- og detailskipan. Gamli lundin tekur sær enn av bókhaldspartinum, men ein projektbólkur, ið fevnir um stórar brúkarar sum Atlantic Airways, Havsbrún, Beta, Fiskamarknaðin, Klaksvíkar kommunu og Norðoya Sparikassi, setir skipanini krøv og luttekur í menningini av bókhaldspartinum. Com-data leggur sum fyrsta virkið sjálvt um til nýggja bókhaldspartin seint í vár.

Í „Sildberanum" er eisini ein viðlíkahaldsskipan, sum upprunaliga er ment til skip. Við skipanini ber eitt nú til at halda skil á tólum, sum krevja ávíst viðlíkahald og at útskriva arbeiðsseðlar. Skipanin ger tað eisini gjørligt at halda skil á degnum, so allar uppgávur ikki fella saman. Sildberin heldur eisini skil á, hvat er gjørt, nær og av hvørjum.

"Havørnin", sum er ein úrtøkuskipan, vendir sær burturav til servirki í fiskivinnu á landi. Havørnin heldur eitt vakið eygað við allari ráværu, sum kemur inn á virkið. Hon hevur skil á, hvussu nógv av ráværuni endar sum slógv og sær, hvørjar liðugtvørur



*Sildberin førir Lundan víðari. Lundin er tiltikna bókhaldsskipanin hjá Com-data, sum hevur sera gott orð á sær*

eru framleiddar. Við Havørnini ber eisini til at útskriva merkisseðlar til plattar, og hon heldur skil á, hvar plattarnir eru, og hvørjar vørur eru á plattunum.

## Betri góðsku og prís

Com-data hevur altíð raðfest fiskivinnuna ovarlaga og hevur verið í fremstu røð, tá ið tað kemur til at menna okkara høvuðsvinnu. Nýggjasta greinin á bulinum, WML (Weight Management og Labeling System), er eitt hent amboð til tess at fáa betri góðsku og hægri prís.

Skipanin er ment serliga til at bøta og minka um handfaringina av fiski. Tankin aftan fyri skipanina er at landa fiskin, skildan og vigaðan, kláran til keyparan.

Úrslitið av skipanini er, at tað slepst undan at skilja og viga fiskin aftur, og tað hevur stóran týdning fyri góðskuna á fiskinum. Umframt góðskuna, sum gevur hægri prís, eru landingarútreiðslur at spara, og tað merkir samanlagt, at skip og manning fáa meira burturúr.

## Etikettur, klokkur og tollur

Tað er ikki bara fiskivinnan, sum kann gera sær dælt av skipanum hjá Com-data. Fleiri av forritunum, sum eru ment til fiskivinnuna, eru flutt yvir í aðrar vinnur, og onnur forrit eru ment til allar vinnugreinar.

Í hesum døgum hevur Com-data ment eina nýggja etikettuskipan, sum bæði er væl egnað til bakarar, handlar og onnur virki. Møguleikarnir eru nógvir. Til ber at tekna sínar egnu merkisseðlar, og búmerki kunnu setast á spjaldrið, sum kann gerast í alskyns formum og skapum.

Klokkuskipanin er eisini hent og heldur skil á, nær starvsfólk koma og fara. Hvørt starvsfólkið fær sín profil og skiljast kann til dømis ímillum, um starvsfólkið arbeiðir fulla ella hálva tíð.

Tollingarskipanin hjá Com-data er somuleiðis ein hjálpandi hond hjá teimum, sum eru troytt av at skriva tær somu upplýsingarnar upp í saman.

## Munur á kommunum

Tað almenna hevur eisini merkt fløvan frá kønu hondunum, sum hava starvast á Com-data síðstu 25 árini. Bileftirlitið, Fiskimálastýrið og Fiskavirkisskipanin hava øll skipanir, sum eru mentar hjá aldursforsetanum í føroysku KT-vinnuni.

Journalskipanin til kommunur er eisini dømi um eina skipan, sum er ment serliga til ein málbólk. Skipanin gevur yvirlit yvir øll mál, og hvør hevur málið undir hond. Sostatt ber til at fylgja málsgongdini frá byrjan til enda, og tað er í evstu løtu til frama fyri borgaran, sum fær eina betri tænastu afturfyri. Harafturat er talan um hent amboð, sum eitt nú kann útskriva yvirlit yvir mál til býráðsfundir, skannar inngangandi skjøl og skrivar útgangandi skjøl í bæði Word, Excel, e-mail og auto-cad.

Com-data hevur eisini ment eitt fólkayvirlit við einum fullfíggjaðum flytingarforriti. Yvirlitið ger tað lætt at síggja samband millum foreldur og børn, hevur nógvar møguleikar at skapa hagtøl.

## Í besta aldri

Com-data hevur megnað at hildið tørn líka síðan 1980. Í gullárunum vóru deildir bæði í Danmark og Grønlandi, og tað hendi seg meira enn so, at útlendingar komu hendanvegin at hyggja. Nú eru umleið 25 fólk í starvi í Klaksvík og Runavík, og Com-data roynir áhaldandi at menna síni frumforrit og at finna nýggjar farleiðir.

Com-data er komin í tann aldurin, tá ið royndirnar og sjálvsálitið gera teg tryggan, og tú framvegis ert fúsur at taka við stórum avbjóðingum.

Byrjað: 1980
Starvsfólk: 25
Stjóri: Olivur Thomsen
Virksemi: Søla av edv, forriting og edv-tænastur.

# Elektroniski risin er við

**Elektron er øðrvísi sum KT-fyritøka, tí hon umframt at menna skipanir, ið samfelagið ikki kann vera fyriuttan, eisini hevur ábyrgdina av at reka tær**



At Elektron er ein risi, ið bæði í støðd og styrki skarar framúr millum hinar føroysku KT-fyritøkurnar, er ikki so løgið. Tað, sum skilir Elektron frá hinum, eru tvey grundleggjandi viðurskifti. Umframt at fyritøkan ger stórar skipanir, rekur hon eisini hesar skipanir fyri kundarnar, og hartil eru eigararnir sum heild teir somu sum kundarnir.

Saman um tikið er virksemið hjá Elektron EDV-veiting. Men undir hesum breiða hatti liggur nakað, sum vanlig fólk neyvan geva sær serligt far um; nevniliga at Elektron, sum varð stovnað fyri sløkum 40 árum síðan, er ein av bulunum undir samfelagi okkara. Hesa støðuna hevur virkið, tí tað hevur ábyrgdina av øllum peningaskipanum og flytingum hjá føroysku peningastovnunum.

Tøkniliga undirstøðukervið í virkseminum hjá Elektron er rættiliga umfatandi. Miðstøðin hjá fyritøkuni er í bygninginum hjá Elektron við Staraveg í Tórshavn. Har eru allar skipanirnar og allir dátugrunnarnir savnaðir. Deildirnar hjá kundunum eru knýttar í hesa miðstøðina gjøgnum landsumfatandi net.

Føroysku peningastovnarnir og Føroya Landsstýri eiga framvegis Elektron, men síðan Elektron byrjaði sum teldugrundað bókhaldsvirki í 1965, er virkisøkið vaksið og ment munandi. Holl vitan og drúgvar royndir við at arbeiða fyri peningastovnarnar hava sum frá er liðið gjørt Elektron skikkað til eisini at taka aðrar uppgávur upp á seg. Millum annað hevur Elektron ábyrgdina av umsitingarskipanunum hjá Toll- og skattstovuni, Húsalánsgrunninum, ALS og Landsbankanum.

Í dag er virksemið hjá Elektron sostatt ógviliga fjølbroytt, hóast bulurin í tí framvegis er fíggjarligar transaktiónir. Fyritøkan er í menning, skilt soleiðis, at ein stórur partur av orkuni fer til at menna nýggjar skipanir og at loysa trupulleikar við nýggjari tøkni.

Eini 30 fólk, t.e. ein sløk helvt av starvshópinum, arbeiða bara við slíkum ætlanum.

Stovnað: 1965
Stjóri: Niels Christian Nolsøe
Starvsfólk: 55
Virksemi: EDV-veiting